# Føroyar–Eysturríki:
# Fer søgan at endurtaka seg?

*Tað sendi skjálvtar gjøgnum allan fótbóltsheimin, tá Føroyar í 1990 vunnu okkara fyrsta undankappingardyst nakrantíð*






*Ivan Egínsson*

Tað er Moskva í 1990. September tann trettandi… .klokkan er hálvgum tvey um náttina.

Ein 16 ára gamal drongur má upp í skúla um morgunin, nakrar tímar seinni. Hann svevur tó ikki. Nei - hann lurtar eftir enskum útvarpi og er spentur uppá úrslitini í júst byrjaðu EM-undankapping. Fyrr um kvøldið var hann á Olympiska leikvøllinum í býnum og sá Sovietsamveldið vinna 2-0 á Noregi. Men hann veit, at tað eisini eru aðrir dystir hetta mikukvøldið. Hann bíðar ótolin eftir úrslitinum hjá Faroe islands...

Eitt ár frammanundan kom hann fram á eina grein, týdda úr enskum ella fronskum, í einum stórum russiskum fótbóltsvlkublaði. Eitt nýtt, fjart og ókent land er júst vorðið limur í FIFA og UEFA. Farérskije ostrová. Faréry. Faroes. Føroyar...

Drongurin hevði frammanundan verið sera hugtikin av Norðurlondum – takkað millum annað ABBA – tí gerst hann beinanvegin áhugaður. Faréry, eitt stuttligt navn... Fjarskotnar oyggjar langt norðuri í Atlantshavinum, Bert nákrar fýrati-fimmti túsund sálir, ein lítil býur í Soviet, har búgva 300 milliónir. Kunnu hesir farércy veruliga spæla bólt???

Drongurin heldur nógv við og av Íslandi, sum var í somu undankappingarbólkum við Soviet í tveimum undanfarnu kappingum - og megnaði at fáa tríggjar 1-1 javnleikir burtur úr teimum fýra dystunum. Eitt lítið nordurland, sum klárar seg so væl! Men nú hevur eitt annað norðurland, enntá nógv minni enn Ísland, meldað seg uppí...

Tað russiska sjónvarpið sendir ikki nakran annan dyst, enn tann sovietiska, hetta kvøldið. Útlendskar rásir ber ikki til at hava. Teksvarp er eitt ókent fyribrygdi her. Alnótin kom ikki fyrrenn nøkur ár seinni. So er tað bert BBC World Service útvarpsrásin at dúva uppá.

Drongurin veit ikki ordiliga, um Faréry eru við hetta kvøldið – ella hvørjum tær skulu spæla ímóti. Eingin leikskrá í hasum bólkinum er at fáa hendur á, bløðini prenta bert leikskránna í bólkinum hjá Soviet. Hann roknar bara við, at Føroyar spæla... men so er bara at bíða. Tað er eisini ein ávísur tíðarmunur í Moskva, so úrstlitini koma ikki fyrr enn á miðjari nátt.

Men so kemur tað...

Faroe islands one – Austria nil!!!

Ein øgilig spreinging. Ein jarðskjálvti. Ein løta, sum stendur føst í minninum hjá einum, sjálvt seytján ár aftaná.

Tað eru nógv, ja, øll tálivandi í Føroyum, sum enn minnast hendan dagin. Men fyri undirritaða fekk hann ikki minni enn kollveltandi avleiðingar. Lívið hjá 16 ára gamla dreinginum í Moskva eftir Landskrona og tann 12.september 1990 hevur ongantíð verið tað sama. Føroyar høvdu ritað seg fastar inn í sinni og hjartað hjá honum – og so nógvum øðrum við! Ein søguligur dystur fyri allan altjóða fótbólt. Ein ógloymandi hending fyri føroysku tjóðina.

...Um seinasta árskiftið ferðaðist eg við tveimum vinmonnum úr Havn í Eysturríki. Enntá við einum bili við føroyskum nummarplatum. Hetta síðsta var nóg eksotiskt sum so, og ofta sóu vit fólk gløða undrandi eftir nummarplatum okkara – ja, so nógv oftari enn í grannalondum hjá Eysturríki!

Vit hildu nýggjárið í Vien. Búðu á gistingarhúsi, fingu okkum onkran bita í einum tveimum matstøðum... Tað vóru bara tilvildarlig fólk rundan um okkum, vanligir eysturríkarar – tænarar, handilsfólk, aðrir kundar... Onkur teirra hevði áhuga fyri fótbólti. Onnur høvdu ikki. Men ØLL mintust tað. Øll kendu til Färöer Inseln. Summi vóru so bilsin at møta nøkrum livandi føroyingum, at tey reageraðu, sum at vit júst vóru komin av einari aðrari planet... Landskrona setti so sanniliga síni spor í eysturríksku tjóðini eisini. Onkuntíð er fótbóltur bara meira enn bara ein ítrótt. Hann er so sanniliga ein "spurningur um lív og deyða"...

Føroyingar hava ikki gloymt Landskrona. Men tað hava eysturríkarar heldur ikki... At Eysturríki so ruddiliga vann returdystin í Salzborg 3- 0, í mai 1991, hevði sum so ongan týdning. Landskrona-úrslitið er ofta nevnt sum beinleiðis orsøkin til øll árini í djúpum aldurdali, sum eysturríkskur fótbóltur fall í beint eftir 1990 - og hevur enn ikki funnið vegin út eftir.

Josef Hickersberger spøkir aftur. Nógv ár mátti gamla Bundesliga-kempan brúka, fyri at vaska Landskrona-skommina av sær aftur. Tó er hon ikki farin rættiliga av. Eysturríkski venjarin er møguliga fyrigivin av landsmonnum sínum. Men ikki soleiðis, at hann, í tíð og ótíð, ikki verður mintur av teimum um hesa løgnu hendingina á venjarayrkisleið sínari.

Í dag er Josef Hickersberger aftur á odda hjá eysturríkska landsliðnum. Tað fer hann eisini at vera í summar, tá ið land hansara, sum onnur vertstjóð, saman við Sveis, og nógv tað lægst styrkismetta liðið í kappingini, skipar fyri fyri einum EM-endaspæli. Stóri spurningurin er, at Hickersberger enn er venjarin hjá Eysturríki, tá ið HM-undankappingin byrjar í heyst.

Eg havi onkursvegna hug til at halda eitt sindur við Eysturrríki undir EM, so at Josef ikki fær enn eitt spark í afturpartin, tá ið tann kappingin er yvirstaðin. Tað hevði verið stuttligt at fingið hann til Føroya, her hevur hann so ikki vitjað áður... At tað verður fult hús á Tórsvølli ella Svangaskarði leygardagin 11. oktober 2008, er lítið at ivast í – bert yvirskriftin Føroyar-Eysturríki má í sær sjálvur lokka væl - og selja ríkiligt!

Ella áttu vit kanska at flutt dystin til Landskrona og royna alt umaftur??? Tað er í hvussu er kærkomið, í einum tøkum tíma og eitt sera gott høvi, at føroyska landsliðið fær eina veruliga uppreisn, eftir so nógvar eyðmýkingar seinastu árini. Og vinnur ein dyst á einari ordiligari og stórari mótstóðu – nakað, sum ikki er hent síðani 12. september 1990 ...

Koyr á, Føroyar - og ger tað einaferð afturat!'